

# Vann á sínum egnu

**FLOGBÓLTUR** Birgit Guttesen, ið hevur fingið sín flogbóltsuppvøkstur í SÍ, var leygardagin hinu megin netið sum ein av berandi spælarunum hjá Mjølni

Hilmar Jan Hansen

– Hetta kennist ordiliga gott, tí tað var stuttligt at spæla í dag. Tað er eisini altíð stuttligt at vera í steypafinaluni, og uppaftur stuttligari var tað, at tað skuldi eydnast at vinna á gomlu liðfeløgunum, segði Birgit Guttesen, eftir at hon hevði fingið steypagullheiðursmerkið um hálsin leygardagin.

– Tað bleiv øgiliga tætt ímóti endanum, og eg gjørdist eitt sindur nervøs. Men vit eru ordiliga sterkar og vóru tað betra liðið í dag.

Mjølnir er eisini á odda í landskappingini og sær tað mest út til, at Mjølnir kemur í FM-finaluna, meðan Fleyr og SÍ mugu kappast um hin finalusessin.

– Ja, vit vilja í finaluna, so tað bara skal vera ein spurningur um, hvør verður nummar tvey og sleppur at spæla ímóti okkum. Sum SÍ spældi í dag, kann tað henda seg, at vit møta teimum aftur í FM-finalunum, segði Birgit.

# »The grand ... lady«

**FLOGBÓLTUR** Marjun Kalsø, sum meiri enn nakar man vera ímyndin av Mjølni, smæddist ikki burtur millum sínar blaðungu liðfelagar leygardagin

Hilmar Jan Hansen

Hóast hon mangan áður hevur staðið í støðuni, at vera við til at taka ímóti bæði gullheiðursmerki og steypið, helt Marjun Kalsø eftir finaluna leygardagin, at hetta var ein serlig ein av slagnum:

– Ja, hetta er eitt øðrvísi gullmerki at vinna, enn fleiri av teimum undanfarnu, tí nú er ikki vist, at eg fái so nógvar finalur aftrat. Og eisini telur uppeftir, at vit aftur vunnu steypakappingina, nú vit hava bíðað í fimm ár eftir tí, segði hon.

Marjun var nógv royndasti spælarin í finaluni, tí umframt eitt ótal av dystum fyri Mjølnir, hevur hon eisini spælt 101 landsdystir. Landsliðið er søga, men framvegis kann hon gera mun í Mjølni.

– Tað er ótrúliga stuttligt at sleppa at vera við til hetta. Eg segði fyri nøkrum árum síðani, at eg var givin at spæla, men eftir steðg í tvey ár, valdi eg at byrja at venja aftur. Og tað er altso ótrúliga deiligt at vera við aftur, sigur Marjun.

– Eg havi tað stuttligt, tá eg eri saman við hesum ungu fólkunum, og fái eg eitt pláss á liðnum, so taki eg tað, sum eg fái.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Mjølnir best fyri

**FLOGBÓLTUR** Lena í Buð, sum hevði longstu servurøðina í kvinnufinaluni, helt styrki- og kropsvenjingina undan kappingini koma liðnum til góðar leygardagin

Hilmar Jan Hansen

– Eg má siga, at eg hevði væntað áðrenn, at tað kundi gerast ein fimmsettari, tí SÍ-kvinnurnar fóru at geva okkum mótstøðu og vildu væl minst líka gjarna vinna, sum vit, segði Lena í Buð, sum í fyrsta setti næstan einsamøll servaði Mjølnir á sigurskós.

Hon helt tó, at tað kom liðnum til góðar, at venjingin longu undan kappingarbyrjan var so hørð og miðvís:

– Fitness-tímarnir hjá okkum munaðu væl nú, tí vit hava vant øgiliga hart. Longu áðrenn kappingin fór í gongd, vandu vit fimm ferðir um vikuna, har vit bæði runnu og lyftu vektir, segði hon.

– Tí vistu vit, at vit vóru í góðum formi, so ein fimmsettara skuldu vit nokk klára. Og tað vísti seg eisini, at okkara kropsliga yvirskot somuleiðis gav sálarligt yvirskot, tá brúk var fyri tí.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Ikki bara skuffað

**FLOGBÓLTUR** Hóast SÍ tapti steypafinaluna, var ikki tað bera vónbrot at síggja á sørvágskvinnum, tí tær hildu seg hava prógvað nakað, eingin hevði væntað av teimum

Hilmar Jan Hansen

– Sjálvt um vit nú hava tapt, eri eg nokk so væl nøgd, tí fólk væntaðu einki av okkum áðrenn. Men eg haldi, at vit stríddust sera væl og gjørdu okkara besta, segði Tórfríð Tavsen, ið spælir libero á kvinnuliðnum hjá SÍ.

– Tí er tað ikki bara vónbot, sjálvt um vit heldur enn fegnar vildu vunnið. Eg eri sjálvandi skuffað, men hetta er ikki heimsins undirgangur. Vit høvdu sett okkum fyri at finna spæligleðina aftur, og tað hava vit gjørt.

Tórfríð sigur, at nú skal tapta steypafinalan brúkast sum íblástur til restina av landskappingini, so SÍ aftur í ár kemur í ta finaluna:

– Ja, vit fara nú at gera alt fyri at koma í FM-finaluna og alt fyri at vinna hana. Tað kunnu vit gott brúka henda dystin til eisini, tí vit hava fingið eina heilt aðra tankagongd í høvdið. Vit kempa meira og vilja tað meira, so tí hava vit ordiliga gott mót upp á tað.

*hilmarjan@sosialurin.fo*